

*Ítróttarhøllin á Giljanesi verður um vikuskfitið karmur um bilasølustevnu, sum FS Vágar Stuðlar skipa fyri*
*Mynd. Edvard Joensen*

# Bilasølustevna á Giljanesi

**Um vikuskiftið skipa FS Vágar Stuðlar fyri bilasølustevnu í ítróttarhøllini á Giljanesi. Umframt nýggjar bilar ber eisini til at bjóða upp á ein brúktan bil og eitt ellisakfar**

SØLUSTEVNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** FSV Stuðlar skipa fyri bilasølustevnu á Giljanesi um vikuskiftið. Byrjað verður leygardagin klokkan 14.00, og hildið verður á til sunnukvøldið klokkan 20.00.

Fimm bilasølur fara at sýna nýggjar bilar fram á stevnuni. Umframt verða bæði tryggingarfeløgini umboðað, eins og Føroya Banki eisini fer at vera til staðar á stevnuni.

Tað verðató ikki bara nýggir bilar, sum verða at síggja á bilasølustenvuni á Giljanesi. Eisini ein av gomlu bilunum hjá Hans Elmari Poulsen í Vatnsoyrum verður at síggja. Og um hóskandi boð fæst, er Elmar sinnaður at selja bilin, siga fyrireikararnir av stevnuni.

Eisini ein annar brúktur bilur verður seldur á stevnuni. Hann er knapt so gamal sum elliakfarið úr Vatnsoyrum. Talan er um ein brúktan Hyundai Accent, sum verður seldur á uppboði leygarkvøldið klokkan 19.00, sigur ein av fyrireikarunum, Páll Joensen.

Sum vanligt er á slíkum stevnum, verður ymiskt undirhald eisini til teirra, sum koma framvið.

Livandi tónleikur verður at hoyra, eins og tað fer at bera til at keypa ymiskt til matna. Eisini verða mótasýningar á pallinum.

Tónleikarar sum Hans Ravnsfjall og Jens Tummas Næs verða at hoyra leygardagin. Og sunnudagin fer fyrst Ungdómsorkestrið í Vágum at spæla, og seinni um kvøldið verður høvið at hoyra Magna Kristiansen á pallinum.

Umframt mangt annað, sum verður at uppliva, verða eisini Gøll og Hvølvus hjá Ráðnum fyri Ferðslutryd á stevnuni.

Sum rímiligt er veðru eisini fótbóltur. Tó bert ein. Sunnukvøldið fer Eyðun Jensen at vísi síni kynstrur við bóltinum. Og tá ber til at tippa um, hvussu ofta hann klárar at sparka til bóltin, uttan at hann nertir við pallin. Tann, sum næstur er, vinnur eina peningagávu, siga fyrireikararnir.

Børn, sum koma saman við foreldrum ella øðrum vaksnum, sleppa ókeypis inn. Og til teirra er eisini ókeypis spælipláss í fimleikarhøllini, siga fyrireikararnir.

# Fyrireika nýggjan skúla í Sandavági

**Tíðin er farin frá Gamla Skúla í Sandavági. Arbeitt verður við nýggjum skúlabygningi til tey smáu børnini**

SKÚLABYGGING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:** Uppskot til bygging av nýggjum barnaskúla í Sandavagi varð lagt til hoyringar á bygdarráðsfundinum í Sandavági hóskvøldið.

Tíðin er farin frá Gamla Skúla, har skúlabørnini við Miðvágs Sandavágs skúla byrja skúlagongdina, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Har er stutt sagt ikki pláss til børnini at vera, staðfestir hon.

Fyrsti, annar og triði flokkur hanga saman í tí, sum nevnt verður innskúlingin. Og tí er als ikki pláss fyri í Gamla Skúla, so tað er av alstórum týdningi at fáa bygt nýggjan skúla nakað skjótt, sigur hon.

Nýggi skúlabygningurin, sum nú verður fyrireikaður í Sandavági, er ein tvísporaður skúli til tríggjar teir yngstu flokkarnar.

Uppskotið, sum lagt varð til hoyringar, er gjørt á teknistovuni West Tech í Sørvági. Talan er um bygning í einari hædd, við seks floksstovum og einari serstovu, sum skúlalógin fyriskrivar, sigur borgarstjórin í Sandavági.

Skúlin verður góðar 800 fermetrar til støddar og fer væntandi at kosta einastaðni millum átta og tíggju milliónir, siga fyribils metingarnar.

Tíðin er farin frá Gamla Skúla í Sandavági. Hann klárar bara so dánt at hýsa fyrsta flokki. Og tað ber ikki til, av tí at innskúlingin hoyrir saman.

Endaliga plaseringin av skúlanum er ikki fastløgd enn, sigur Rósa Samuelsen. Samráðingar skulu fyrst vera um lendið, men greitt er, at skúlin fer at liggja inni í bygdini í Sandavági.

Rósa Samuelsen sigur, at tey í bygdarráðnum meta tað ógvuliga týdningarmikið fyri kommununa at hava góðar umstøður til barnaansing og skúla.



*Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági við uppskotinum til nýggja skúlabygningin, sum ætlandi skal byggjast í Sandavági*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýggjur skipshandil í Sandavági

**Nýggjur handil við fiskireiðskapi, arbeiðsklæðum, nautiskum tólum og øðrum, sum horyir bátinum til, er latin upp í Sandavági**

HANDIL
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:** Nýggjur skipshandil er latin upp á Hammershaimbsvegi 25 í Sandavági. Í hølunum, har Fotohjørnið fyrr helt til.

Tað eru partar av handlinum hjá Hjørleifi Joensen í Miðvági, sum fluttir eru til Sandavágs. Og so er annað komið afturat, sigur Hans Gudmundsen, sum saman við Stefani Simonsen stendur fyri nýggja handlinum í Sandavági.

Teir selja ymiska nautiska útgerð, sum Hjørleif Joensen umboðar, eins og teir eisini hava annað, sum teir sjálvir hava umboð fyri, umframt vanligar brúksvørur sum fiskireiðskap og sjóklæði.

Nýggi handilin selur navigatiónsútgerð av sløgunum Raymarine og Magellan. Teir hava avtalu við mekanikara, so um neyðugt skuldi verið við umvælingum, klára teir eisini tað, sigur Hans Gudmundsen.

Fiskireiðskap fara teir at selja til mestum einhvønn tørv, sigur hann. Tó væntar hann ikki, at teir fara at liggja inni við trolreiðskapi. Men línu og snellumenn kunnu fáa tað, teir hava brúk fyri, verður sagt.

Nýggi handilin í Sandavági fer dagliga at hava opið frá klokkan níggju á morgni til hálvgum seks. Tó leygardagar til klokkan 13.00.




*Í nýggja skipshandlinum í Sandavági ber til at fáa alt frá ullintum skóleistum til radarar og handhildnar GPS'arar*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Leggja sak ímóti Tvøroyrar Býráð

**Pedagogfelagið fer at stevna Tvøroyrar Býráð eftir endurgjaldi í sambandi við leiðaran á frítíðarskúlanum**

FRÍTÍÐARSKÚLIN Á TVØROYRI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Pedagogfelagið fer nú at stevna Tvøroyrar Býráð.

Tað er málið um fyribils leiðaran á frítíðarskúlanum á Tvøroyri, sum Føroya Rættur nú sleppur at taka støðu til.

Frammanundan er Løgtingsins Umboðsmaður biðin um at taka støðu til embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm í málinum.

Men Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum, sigur, at felagið metir málið so álvarsligt, at tað nú eisini verður roynt í rættinum.

Ì Rættinum fer Pedagogfelagið at krevja, at pedagogurin, sum varð vrakaður til starvið, fær endurgjald.

Men felagið fer eisini at stevna fyri brot á tagnarskyldina og fyri brot á fyrisingarlógina og fyri handfaringina av málinum sum heild.

Felagið kann nevniliga undir ongum umstøðum góðtaka grundgevingarnar, sum pedagogurin hevur fingið fyri ikki at fáa starvið.

– Grundgevingin, sum pedagogurin hevur fingið fyri ikki at fáa starvið sum leiðari á frítíðarskúlanum, botnar í nøkrum, hon segði á einum foreldrafundi í barnagarðinum fyri einum ári síðani, har hon møtti sum foreldur, sigur Jarvin Feilberg Hansen

- Á hesum sama foreldrafundi møtti eisini Sverri Midjord, býráðslimur, sum er yvir 70 ár og ongi børn hevur.

– Og eg haldi, at tað er átaluvert, at býráðslimurin møtir upp, har hann onki hevur at gera. Men tað er eisini átaluvert, at hann ber útaftur, tað, sum verður sagt á fundinum, so at býráðið kann brúka tað til at vraka hana sum leiðara meiri enn eitt ár seinni.

Formaðurin í Pedagogfelagnum sigur, at skrivliga orsøkin, sum pedagogurin fekk frá býráðnum fyri, hví hon ikki fekk starvið, er prógv um, at tað er hesin foreldrafundurin fyri einum ári síðani, sum er orsøkin til, at hon ikki fekk starvið.



*Tað kann ikki góðtakast, at ein pedagogur á Tvøroyri verður mettur at verða óegnaður sum leiðari á frítíðarskúlanum tí at hon kanska hevur øst seg upp á einum foreldrafundi í barnagarðinum fyri einum ári síðani, sigur formaðurin í pedagogfelagnum*

Hann sigur, at orðarætt stendur í grundgevingini frá býráðnum til pedagogin, at "mett verður ikki, at tygum hava teir neyðugu, persónligu eginleikarnar at røkja eitt slíkt leiðarastarv.

Mett verður at tygum í nøktandi mun ikki eru før fyri at stýra í pressaðum situatiónum og tað er eftir býráðsins áskoðan ein eginleiki, sum krevst av eimum leiðari av einum slikum stovni og sum býráðið leggur avgerandi dent á.

Sum konkret dømi um hetta verður víst til ein fund ímillum foreldur og starvsfólk í barnagarðinum, har tygum tóku lut sum for-eldur og har eisini býráðslimir vóru hjástaddir.

Tað kom týðiliga til sjóndar at tygum ikki í nøktandi mun klára at stýra tygara temperementi, at tygum østu tygum upp yvir lítið og onki og eisini brúkti ljótan munn.

Jarvin Feilberg Hansen sigur, at á foreldrafundi er tagnarskylda og har hava eisini foreldur rætt til at koma fram við tí, tey eru ónøgd við.

Men hóast talan er um tagnarskyldu, hevur Sverri Midjord brotið tagnarskylduna og hevur brúkt til eina starvssetan eitt ár seinni.

Hann vísir eisini á, at pedagogurin var biðin um at røkja leiðarastarvið í tríggjar vikur eittskifti og tað hevði býráðið neyvan gjørt um tey mettu hana so óegnaða, sum tað nú sær út.

